## Manskór jólakonsert

Í annaðkvøld, hóskvøldið, hevur Tórshavnar Manskór jólakonsert í Múllers Pakkhúsi í Havn. Á skránni eru nakrir av teimum sangunum, sum kórið hevur vant í sambandi við 20 ára hátíðarhaldið hjá kórinum, sum verður í Norðurlandahúsinum 3. februar næsta ár. Manskórið sigur, at á konsertini í Múllers Pakkhúsi fáa fólk høvi at lata jólastákið liggja eina løtu og heldur njóta góðan sang og tónleik. Konsertin hóskvøldið verður kl. 20.

## Sleppur ikki so

Kári P. Højgaard boðaði fyrr í vikuni Løgtinginum frá, at hann vil sleppa frá sum formaður og limur í landsstýrismálanevndini. Formansstarvinum sleppur hann úr á næsta fundinum hjá nevndini, men tað er Løgtingið, sum ger av, um hann skal sleppa úr nevndini. Landsstýrismálanevndin skipar seg sjálv, og tí verður annar av hinum báðum limunum formaður. Teir eru Kjartan Joensen úr Fólkaflokkinum og Karsten Hansen, uttanflokkatingmaður

# Áhugaverdar royndir vi

**Bjarti Thomsen, fiskifrøðingur og verkfrøðingur, hevur gjørt royndir og skrivað frágreiðing um veiði við rúsu, sum er umhvørvisvinarligur og lítið orkukrevjandi fiskireiðskapur. – Royndir eru gjørdar fyri at menna eina rúsu, sum kann brúkast til okkara vanligu fiskasløg. Undirsjóvarmyndir av, hvussu fiskur ber seg at, geva ábendingar um, at rúsa kann tillagast, so hon betur kann veiða eitt nú tosk og hýsu, sigur hann**



RÚSUROYNDIR

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Nógv ymisk sløg av fiskireiðskapi hava verið brúkt upp ígjøgnum tíðirnar. At kasta nót og at fiska við húki er elligamalt, men trolið, sum vit kenna tað í dag, hevur ikki stórt meira enn 100 ár á baki.

Ein reiðskapur, sum er rættiliga gamal,men sum bert verður brúktur til ávís fiskasløg og krabbadýr, er rúsa. Rúsa er tiltalandi sum fiskireiðskapur, tí hon er umhvørvisvinarlig, er lítið orkukrevjandi og kann taka fiskin livandi.

### Ikki vælegnaðar

– Tær rúsur, sum vit kenna, hava tó ikki riggað serliga væl til okkara fiskasløg og hava tí verið lítið brúktar hjá okkum. Royndir eru gjørdar í 2005 og halda fram í 2006 fyri at tillaga eina rúsu, so hon kann brúkast at veiða eitt nú tosk og hýsu.

Í grein á heimasíðuni hjá Fiskirannsóknarstovuni greiðir Bjarti Thomsen, fiskifrøðingur og verkfrøðingur, frá tí arbeiði, sum gjørt er á hesum øki.

Hann sigur, at norðmenn í longri tíð hava roynt at funnið fram til eina rúsu, sum kann fiska rundan fisk.

– Tað síðsta, sum teir eru komnir fram til, er ein sonevnd "to-kammer-tejne", sum teir rópa hesa rúsuna. Hendan hevur tvey rúm - eitt niðara, sum hevur inngongd í báðum endum og eitt ovara, sum ger, at verri er hjá fiski at finna útaftur.

Bjarti sigur, at norsku royndirnar vísa, at 6-7 tílíkar rúsur fiska umleið tað sama sum ein línustampur.

### Samstarv við norðmenn

– Samstarv er við norsku granskararnar, og føroysku royndirnar byrjaðu við hesi rúsuni.

Hann vísir á, at við undirsjóvarkamera hevur verið eygleitt, hvussu fiskur ber seg at í mun til rúsuna, og komið er fram til fleiri veikleikar við eini tílíkari rúsu.

– Fyrst og fremst er tað avgerandi, hvønn veg rúsan vendir í mun til streym, meðan hon stendur á botni. Fiskurin leitar altíð beint upp móti streyminum og fram móti agninum. Um inngongdin ikki peikar undan streyminum, finnur fiskurin ikki inn í rúsuna, sigur fiskifrøðingurin.

Hann sigur, at rúsan, sum hevur verið roynd, er heldur ikki nóg stútt og fall tí partvíst saman, tá ið rákið harðnaði.

– Fyri at loysa hesar fyrstu trupulleikarnar, varð ein nýggj rúsa gjørd, sum var leys av botni. Annar endin var festur í lodd, sum lá á botni og hin endin, har inngongdin var, soleiðis at rúsan kundi snara undan streyminum. Hendan rúsan varð eisini gjørd heldur lægri fyri ikki at fella saman, tá streymur er.

Bjarti Thomsen sigur, at á sløttum botni er eingin trupulleiki at fáa rúsuna at venda sær undan streyminum, men er óslætt og grítutur botnur, er skjótt, at rúsan kemur føst og ikki sleppur runt.

– Ein rúsa, sum er leys av botni, er eisini óstill í sjónum og kann møguliga fáa fisk at verða meira varnan at nærkast. Ætlanin er tí at gera eina rúsu, sum stendur stútt á botni, men har fiskur sleppur inn frá øllum síðum.

### Agn sum fiskar

Fiskifrøðingurin sigur, at ein veikleiki við øllum fiskireiðskapi, sum brúkar agn at lokka fiskin við, er, at útgjaringin frá agninum minkar rættiliga skjótt.

– Eitt nú minkar lukturin frá einum makrelagni niður í helvt eftir einum tíma og niður í ein triðing eftir tveimum tímum. Roynt hevur tí verið at funnið fram til eitt agn, sum gjarar út í eitt longri tíðarbil. Ein háttur er at brúka tiðningartíðina á frystum agni til at leingja um útgjaringina. Smátt sundurskorið ella malið agn hevur verðar latið í ein bjálvaðan húsa og fryst.



*– Rúsa er tiltalandi fiskireiðskapur, men enn er eingin rúsa, sum er nóg góð til eitt nú tosk og hýsu, sigur fiskifrøðingurin*